FISKIMÁLARÁÐIÐ

## Hálvdagssettur assistentur til Føroya Náttúrugripasavn í eitt ár

Ein av okkara lívfrøðiassistentum fer í farloyvi frá 15. juni 2007 – 15. juni 2008, og søkja vit tískil eftir einum avloysara í hesum tíðarskeiði.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá asssistentinum er at vera hjálparfólk í samband við verkætlanir um havsúgdjór og herundir at savna tilfar til djóradeildina á savninum.

Viðkomandi skal eisini kunna taka lut í øðrum arbeiði á Náttúrugripasavninum.

**Førleikakrøv**
Fyrimunur er, at umsøkjarin:
- hevur kunnleika og royndir viðv. havsúgdjórum
- hevur vanligt koyrikort
- hevur royndir til sjós
- dugir at tosa enskt

**Treytir**
Setanartreytir og løn verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið ella avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og arbeiðsplássið verður Føroya Náttúrugripasavn.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, mugu vera Føroya Náttúrugripasavni í hendi í seinasta lagi 1. juni 2007.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Náttúrugripasavn, Debesartrøð**
**V.U.Hammersheimbsgøta 13, 100 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Náttúrugripasavnið á tlf. 35 23 20 og tosa við Dorete Bloch, stjóra.

Føroya Náttúrugripasavn
DJÓRADEILDIN
FÚTALÁG 40 • 100 TÓRSHAVN
Telefon 35 23 20 • Telefax 35 23 21 • doreteb@ngs.fo

## Deildarleiðari til Kappingarskrivstovuna og Skráseting Føroya

Eitt nýtt starv sum deildarleiðari fyri Kappingar-skrivstovuna og Skráseting Føroya er leyst at søkja.

Uppgávan hjá Kappingarráðnum er at umsita løgtingslóg um kapping. Lógin hevur til endamál at fremja kapping og harvið styrkja virkisførið í framleiðslu og handli av vørum og tænastum v.m.

Skráseting Føroya umsitur lóggávurnar um partafeløg, smápartafeløg, ársroknskap, skrásettar grannskoðarar og løggildar grannskoðarar. Virksemið er fíggjað við umsitingargjøldum.

**Uppgávur hjá deildarleiðaranum fevna m.a. um at:**
Prioritera uppgávur soleiðis at játtanin til Kappingarráðið og Skráseting Føroya verður gagnnýtt á best møguligan hátt. Samskipa allar uppgávur innan kappingarøkið og Skráseting Føroya.

Delegera uppgávur til fulltrúarnar á stovninum

Fyrireika mál at leggja fyri Kappingarráðið

Virka sum talsmaður fyri Kappingarráðið og hava yvirskipaðu leiðsluna á Skráseting Føroya.

Samskifta við aðrar føroyskar og útlendskar myndugleikar á økinum.

Verða við í arbeiðinum at gerða modell sum skulu nýtast sum amboð í eftirlitinum við føroysku marknaðunum og virkjum, herundir til lýsing av kappingarintensitet, ognarviðurskiftum o.s.fr.

Verða við til at betra um arbeiðsgongd og mannagongdir annars á stovninum.

Harumframt kunnu verða líknandi uppgávur at loysa fyri Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirliðið.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava:
- hóskandu útbúgving frá hægri læristovni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting
- royndir innan kappingarrætt og málsviðgerð av kappinarmálum
- leiðsluroyndir

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, seta seg inn í lógarviðuskifti á vinnu- og kappingarøkinum og hava hegni til at leiða og fordeila arbeiði á deildini.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við avvarðandi fakfelag. Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýrir.

Umsóknir, saman við prógvum, CV og møguligum ummælum, skulu sendast til:

**Jógvan Thomsen**
**Fjarskiftiseftirlitið**
**Skálatrøð 20**
**Postboks 73**
**FO-110 Tórshavn**

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 18. juni 2007 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Thomsen, stjóra, tlf. 35 60 20 ella 21 60 20.

Kappingarráðið og Skráseting Føroya hava felags stjóra og skrivstovu saman við Post- & Fjarskiftiseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

NORMEK



## P/F Normek søkir eftir goymslulærlingi til at byrja skjótast gjørligt

Arbeiði umfatar innkeyp, sølu, logistik og annars verða við til at optimera lagri.

**Førleikar tínir:**
Dentur verður lagdur á, at tú hevur góðan førleika at arbeiða við teldu.

**Lærutreytir:**
Lærutíðin byrjar skjóast gjørligt, og arbeiðið og útbúgvingin eru skipað eftir galdandi reglum.

**Løn:**
Lønin verður ásett sambært galdandi lærusáttmála.

**Umsókn og tíðarfreist:**
Umsókn skal sendast til P/F Normek, Tróndagøta 63, FO-512 Norðragøta, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. Juni 2007.

## KOYRIKORT?
EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 23. mai 2007 kl. 18:00.**




**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |

**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**



## TIL SØLU

Mitsubishi L200 árg. 09/01 koyrt 85.000 km.
Lastbilurin hevur sleipikrók.

Prísuppskot: kr 150.000

**Tlf 211269**

Sosialurin
www.sosialurin.fo